


FØRARAR TIL BETONGBILAR

J & K Betong søkir eftir førara til betongpumpubil og betongbil. Talan er um krevjandi arbeiði og roknast kann við nógvari yvirtíð. Tann, ið settur verður, kann byrja beinanvegin, men vit eru tilreiðar at bíða eftir rætta persóninum.

Løn sambært avtalu.

Sendið umsóknina til adressuna niðanfyri, stílað til Arngrim Arngrimsson, blandimeistara.
Spurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast Arngrími á tel. 585025.

J&K

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn
tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: betong@jkp.fo | www.jkp.fo | Blandimeistarin tel 58 50 25

J & K Betong


# Lizzie skrivar søgu



**Fólk í hópatali keypa sangin "Ramt I Natten" hjá føroysku Lizzie gjøgnum alnetið. Hon nærkast størstu søluni, sum nakrantíð hevur verið í Danmark**

TÓNLEIKUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Sølan vísir, at hátturin við at keypa sangir av alnetinum av álvara hevur bitið seg fastan. Fólk vilja hava hittið, og er sangurin góður, so vilja tey fegin gjalda fyri hann eisini.

Tað gongur strúkandi við yrkisleiðini hjá Lizzie. Sangurin "Ramt i Natten" gongur sum heitt breyð millum danir, og gongur alt sum ætlað, so skrivar føroyingurin søgu komandi vikuna. Hon nærkast nú sínum triðja platin.

Platin fær ein tónleikari, tá hann ella hon hevur selt 15.000 eintøk. Lizzie hevur við sanginum "Ramt í Natten" ikki selt færri enn 42.500 og manglar tískil lítið í, áðrenn hon kann fáa sítt triðja platin-status. Talið er metstórt í Danmark, tí ongantíð áður hava so nógv keypt ein sang umvegis alnetið. Felagið ArtPeople væntar, at hetta megnar hon ta komandi vikuna.

- Vit eru bæði fegin og sera, sera errin, sigur Thomas Broge-Starck frá Art People við heimasíðuna www.jp.dk


Karamellur

Avmarkað nøgd



1 kg. fyri bert

69,95

Fæst á hesum støðum
Shell á Frælsinum
Shell við Ringvegin
Shell í Gøtudali
Shell í Klaksvík